**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, MM og HPJ |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 9. apríl 2013, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

**Umrødd evni:**

1. **Bygnaður**
   - Verandi bygnaður á megindeildunum varð umrøddur.

2. **Upptøka av masterlesandi í heyst**
   - Serstakt umsóknarblað skal gerast fyri masterútbúgvingarnar, sum verða bodnar út í 2013.

3. **Gjald fyri stakskeið, MM leggur fram uppskot**
   - Skeiðsgjøldini eru ásett rættiliga ymiskt frá deild til deild. Leiðslan hevur ynski um at skapa størri gjøgnumskygni og javngera skeiðsgjøldini. Niðurstøðan á fundinum var, at ískoytisútbúgvingar, t.e. útbúgvingar sum ikki eru partur av eini grundútbúgving, eiga at kosta 500 kr. pr. ECTS. Við hesum lækkar skeiðsgjaldið fyri ískoytisútbúgvingarnar frá 21.000 kr. til 15.000 kr.
   - Somuleiðis skulu tóm pláss bjóðast út á øllum deildum fyri 200 kr. pr. ECTS.
   - "Opið Setur" verður kannað nærri.
   - Fyrisitingarstjórin arbeiðir víðari við málinum saman við fíggjarleiðaranum.

4. **Studentar við serligum tørvi**
   - Setrið eigur at hava møguleika at geva dispensatión til studentar við serligum tørvi, t.d. innan skeiðsgjøld.

5. **Kunning frá Leska um tungan rakstur**
   - Fyrisitingarstjórin tekur málið upp við Leska

6. **Góðkenning av fundarfrásøgn**
   - Er gjørt

**Næsti fundur:**

Týsdagin 16. apríl, 2013